## Leita eftir sjáldsomum fuglum

»Operation Færøerne« er í gongd. Talan er um eitt tiltak, har áhugaði fara at nýta komandi dagarnar fara at hyggja eftir fugli runt oyggjarnar. Flestu luttakararnir eru úr úr Danmark og komu við Norrönu í gjár. Tó so, onkur føroyingur eisini við. Ætlanin við tiltakinum er at síggja sjáldsom fuglasløg, sum roknað verður við eru í landinum fyri tíðina, skrivar FaroeNature.fo. Ein lítlan tíma eftir at luttakararnir vóru komnir í land varð fyrsta sjáldsama slagið funnið. Fyri fyrstu ferð varð ein mýrierla »Motacilla citreola« sædd í Føroyum. Hetta var við tyrlupallin við Landssjúkrahúsið.



## Porkeri fær viðarlund

Kommunan í Porkeri er farin undir arbeiðið at gera eina viðarlund. Ætlanin er at fáa eina viðarlund vesturi í Mýridalinum. Kommunan hevur søkt um stuðul til endamálið, og arbeiðið at drena og fríðka økið er byrjað. Børnini eru við í verkætlanini, og í summar hava øll skúlabørn og dagrøktarbørni í Porkeri plantað trø við ánna niðri í bygdini. Umframt hetta hevur kommunan breiðkað Bakkavegin, skrivar Suðuroyarportalurin.

# st 50.000 tons færri í ár



*- Eitt er, at vit kunnu vænta at fáa minni sild um heystarnar, og annað er, at svartkjaftakvotan ætlandi skal minka tey næstu árini. Hetta ger, at alternativ eru kærkomin og ein av møguleikunum, ið vit vóna, at meira verður gjørt við, er royndin eftir prikkafiski, sigur Hartvig Joensen á Havsbrún*

- Heystið skuldi verið besta tíð hjá virkinum í Kollafirði, men nú sildin stendur norðarliga, endar lastirnar í Noregi.

Hann sigur, at tá ið fleiri sildalandingar eru til matna í Føroyum, dettur ein partur, sum ikki kann fara til matna, av í Fuglafirði.

- Men við sildaavtaluni er alt mynstrið í heyst broytt, leggur hann aftrat.

Hartvig sigur, at sjálvandi gevur nýggja sildaavtalan skipum og manningum góðar inntøkur, og tað er eitt kupp fyri teir.

- Sambært norskum fjølmiðlum sleppa fýra norsk virkir at selja sildavørur til Ruslands, men tað eru fleiri enn hesi fýra virkini í Noregi, sum keypa og virka sild. Í fjølmiðlunum skilst eisini, at kappingin í Noregi um sildina hevur verið hørð. Hetta hevur hildið prísunum uppi, men hugsandi er, at hetta samstundis hevur gingið eitt sindur útyvir avkastið hjá virkjunum.

Hartvig sigur, at tað, sum tey á Havsbrún nú vóna, er, at føroysku skipini fara á svartkjaftaveiði aftur í november og desember, so virkið tá kann fáa nakað av ráfiski aftrat.

- Síðan byrjar tann góða svartkjaftavertíðin aftur um hálvan januar, og hetta er vanliga besta tíðin hjá okkum, sigur hann.

Seinastu svartkjaftalastina keypti Havsbrún í juli. Hetta var smá 200 tons, sum Carlton legði upp í Fuglafirði.

### Alternativ veiða

- Nú teir eru lidnir á sildini, hevur Carlton aftur verið úti og gjørt eina roynd eftir prikkafiski, men hendan royndin gav einki.

Hartvig sigur seg fegnast um, at alternativar royndir verða gjørdar, nú ráfiskaútlitini eru versnandi.

- Eitt er, at vit kunnu vænta at fáa minni sild um heystarnar, og annað er, at svartkjaftakvotan ætlandi skal minka tey næstu árini. Hetta ger, at alternativ eru kærkomin og ein av møguleikunum, ið vit vóna, at meira verður gjørt við, er royndin eftir prikkafiski.

Hann sigur, at teir á Carlton áður hava sæð skriftir í sjónum, sum ikki eru fingnar í trolið, og tí høvdu teir eitt serligt trol við hesaferð.

- Men nú sóu teir ikki skriftina, ið teir vónaðu at síggja á hesum túrinum, sigur Hartvig Joensen á Havsbrún.

Í gjárkvøldið var grønlendski báturin, Erika á Fuglafirði við sløkum 400 tonsum av sild. Teir skuldu higar til lands eftir einum troli, og tí løgdu teir veiðina upp í Fuglafirði.

# Økir eftirspurningin eftir fiski

**Í Bretlandi vænta fiskaframleiðarar, at munn-og kleyvsóttin í Suðuronglandi fer at veksa um eftirspurningin eftir fiskavørum**

BRETLAND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at munn-og kleyvsótt er staðfest í Suðuronglandi, eru kjøtprísirnir í Bretlandi hækkaðir, tí minni kjøt er á marknaðinum.

Sea Fish Industry væntar, at hækkaðu kjøtprísirnir fara at føra til øktan eftirspurning eftir fiskavørum.

Kostnaðurin av fóðuri hjá bretsku bóndrunum er næstan tvífaldaður, nú færri neyt verða slaktað og fleiri kríatúr eru at fóðra.

Umstøðurnar gera, at kjøtprísurin økist.

Herfyri varð flutningsbannið av kjøtið tó tikið av aftur, og bretsku bóndurnir sleppa aftur at framleiða kjøt.

Men spurningurin er, hvat umheimurin sigur, og nær hann kennur seg tryggan við at keypa kjøtvørur aftur úr Bretlandi.

Ein annar spurningur er, hvussu gongdin verður í nærmastu framtíð.

Tá fáa kríatúr verða slaktað, minkar útboðið, og prísirir fara upp. Hinvegin er spurningurin, um útboðið í Bretlandi ikki kann fara at veksa, um umheimurin aftrar seg við at keypa neytakjøt úr Bretlandi.

Men, sum støðan er í løtuni, vænta bretskir fiskaframleiðarar, at eftirspurningurin eftir fiskavørum fer at veksa, tí kjøtprísirnir eru hækkaðir, nú útboðið hevur verið minni enn eftirspurningurin.



*Bretskir fiskaframleiðarar vænta, at eftirspurningurin eftir fiskavørum fer at veksa, nú útboðið av neytakjøti er minni, og prísirnir eru høgir*